3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

EIVIND NICLASEN

Starz!?

Party

Hesin litfagri svenski kvinnubólkur gjørdi fyrst vart vi› seg undir navninum Star, tá i› tær á heysti í fjør góvu út á stakfløgu eina útgávu av gamla Kiss travaranum Heaven´s On Fire sum amerikonsku glamrockararnir upprunaliga høvdu eitt hit vi› í 1984. Stutt eftir hótti ein amerikanskur bólkur, sum eisini nevndi seg Star, vi› at stevna svensku sprundini, sum orsaka› av hesum hava avgjørt at nevna seg Starz!?

Stílurin á fløguni peikar meiri aftur í áttatiárini enn inn í n‡ggja ártúsundi. Løgini eru frek og kroppslig og fløgan er væl framleidd. Ljó›myndin minnir í stø›um um forritarnir hjá t.d. Aqua og Britney Spears, bara her eru ullunti bassurin og svamputu trummurnar tilsettar eitt sindur av elementerum 80´ara fuzzguitar rytmuspæli.

Ta› er greitt líka frá byrjan at her er líka so nógv talan um eitt koncept sum um ein bólk sum handfer ljó›førini sjálvur tá i› tær standa á palli. Einasti limurin í Starz!? sum spælir naka› ljó›føri á hesi fløguni er guitarleikarin Mia. Útsjóndin á gentunum er í trá› vi› tónleikin, ta› vil siga, litfagur og í stø›um flamboyant yvirdrivi›.

Eitt anna› gamalt 80´ara hit er eisini sloppi› vi› á hesa fløguna og hesufer› sn‡r ta› seg um lagi› I Remember You, sum amerikansku Skid Row úr New Jersey høvdu eitt stórt hit vi› í 1989. Bæ›i coverløgini eru í trá› vi› restina av fløguni, sum av sonnum livir upp til heiti› á sjálvari fløguni, Party.

Fyrsta lagi› The Good, The Bad And The Ugly leggur stílin fyri fylgjandi løgunum : Ljó›i› pumpar avsta› vi› saftigum og kjøtiligum ósmædni og einum framlei›sluljó›i sum klárt og t‡›iliga signalerar at konufólki saktans eru før fyri at rocka mediumhart vi› løttum og einfaldum poppmelodium.

Onnur løg sum eisini halda sama lætta og hedonistiska stíl eru m.a. Girls They Like To Party, Wig Wam Bam, This Is My Life og tann erpni partyrockarin I Got The Look, sum nærum kókar yvir av hør›um og bringuspentum sjálvsáliti. Sostatt kann sigast at fløgan sum heild kann uppsummerast sum lættuppfatiligur veitslurockur. Ni›urstø›an er at Starz!? ikki hava ta› stóra uppá hjarta, tær vilja bara so fegnar sleppa at spæla og ta› skullu tær eisini vera vælkomnar til.

Guano Apes

Don't give me names

Hetta er 2. útgávan sum henda t‡ska rockkvartettin hevur lati› úr hondum. Tann fyrra, Proud Like A God, kom út í 1997 og rúma›i solid og hartsláandi rockløg so sum Open Your Eyes og tann máttmiki› og buldrandi Loards Of The Boards, har forsanginnan Sandra veruliga lat síni muskuløsu stemmubond seta dagsskránna.

N‡ggja fløgan, sum kom út í fyrru helvt av mai mána›a, tekur trá›in upp har Proud Lika A God slepti. Løgini eru gjøgnumgangandi tung og larmandi, tó mest í ni›urløgunum. Versini eru eitt sindur meiri eksperimenterandi har elementir úr bæ›i pop og funk genruni vera vavd saman vi› vanligari rocktyngd. Fyrsta stakfløgan av fløguni er tó ikki skriva› av teimum f‡ra t‡skarunum sum manna Guano Apes, men er harafturímóti eitt av kendastu hittunum hjá einum ø›rum t‡skum bólki, nevniliga Alphaville. Lagi› nevnist Big In Japan og er í útsetingini hjá Guano Apes nærum ikki til at kenna aftur.

Líka frá fyrstu skering, Innocent Greed, er greitt at Guano Apes eru væl nøgd vi› ljó›i› av teirra fyrru fløgu, tí í produktiónini er onki broytt í mun til fyrru útgávuna. Lag nummar tvey, No Speech, er í nøkurlunda sama stíli sum eitt av kendu løgunum úr fyrru fløguni, nevniliga Open Your Eyes, vi› relativt hóvligum og afturhildnum spæli í versunum, fyri so at brøla fyri fullum útblástri í ni›urlagnum.

Ein tílíkur uppbygna›ur í útsetingini krevur í hesum føri ein veruliga sterkan melodi fyri at bólkurin kann gera sær vónir um at koma so nøkurlunda sannførandi gjøgnum blendaran. Hetta eydnast tó til fulnar, men eftirfylgjandi lagi›, ta› fyrr umrødda Big In Japan sum er einasta coverlagi› á fløguni, tekur eitt sindur av glansinum vekk av Don´t Give Me Names sum heildarmynd.

Ta› er púrasta óskilligt at tey f‡ra hava valt at innspæla júst hetta lagi› ; av teim 13 løgunum sum eru at finna á hesi fløguni er Big In Japan eftir mínum tykki so nógv ta› veikasta. Restin av fløguni vísir ein bólk í fullum blóma, vi› einum sterkum og sannførandi savni av sjálvgjørdum løgum og sum eisini er vælsigna›ur vi› einum av uttan iva bestu og mest fleksiblu sangarunum á dagsins tónleikapalli.



HIM

Razorblade Romance

Ein bólkur sum rættiliga er koman fram hesar seinastu mána›arnar, er Him úr Helsinki í Finnlandi. Serliga er ta› í T‡sklandi at teir hava veri› væl móttikni›r - kanska av tí at teir vi› eitt sindur av gó›um vilja kunnu síggjast sum eitt slag av lættvektarútgávu av Rammstein. Stílurin er eisini metalliskur og myrkur, vi› einum serligum gotiskum dámi og vi› einum ljó›i sum í stø›um er uppbloytt vi› 80´ara kendum keyboardfladum. Júst vi› hesum í tonkunum ber til at samanbera teir vi› keyboardrockarar úr áttatiárunum sum til dømis House Of Lords, Dare og Alien. Men Him eru tó munandi meiri nútímans, serliga vi› vælumhugsna›ari n‡tslu av akustiskum ljó›førum og útsetingum sum hava meiri vi› 90´ini at gera enn vi› 80´ini.

Oddama›urin og sangarin nevnir seg bert Valo og hann er ein harri av tí meiri karismatiska slagnum ; eisini røddin hjá honum er sermerkt, sum t.d. á lagnum Join Me In Death har hann skiftir millum luftiga falset, autoriteran bass og sum tí›ir samantvinnar hesar mótsetningar vi› einum insisterandi millumli›i. Sum sangari tykjist hann ávirka›ur av serliga Iggy Pop og Bono úr U2. Eitt anna› lag sum eisini skarar fram úr er gamla Chris Isaak lagi› Wicked Game. Ta› hev›i veri› meiningsleyst at framført lagi› á sama hátt sum Chris Isaak sjálvur gjørdi ta› - hansara egna útgávu er jú fullkomin - so ísta›in hava Him avgjørt at ganga eina heilt a›ra lei› og hava lati› sangin í ein tungan búna av metalliskum guitarspæli, bleytum keyboardakkordum og omaná á alt frambori› av myrka sangstílinum hjá Valo. Úrsliti› er djarvt og ø›rvísi, uttan at røkka somu hæddir sum upprunaliga útgávan av sanginum, men sum eksperiment er ta› tó bæ›i flott og fascinerandi.

Á fyrsta lagnum Your Sweet 666 eydnast ta› hjá bólkinum at sameina eina gó›a balancu vi› eini har›ari intro og bleytari versum fyri sí›ani at f‡ra ni›urlagi› á lagnum av í kongenialum samspæli sum váttar ta› sum byrjanin á lagnum lova›i. Fyrimyndarligt balancukynstur.

Næsta lagi›, Poison Girl, er í sama stíli og stendur ikki aftan fyri Your Sweet 666 hvat vi›víkur gó›sku og framfør›slu. Saman vi› ø›rum framúrskarandi løgum so sum Gone With The Sin, Razorblade Kiss og I Love You eru hesar framfør›slur imponerandi brottpartar av eini flottari og vælstoyptari heild, har løgini Right Here In My Arms, Bury Me Deep Inside Your Heart, Wicked Game og tann serliga hugtakandi Join Me In Death eru hæddarpunktini.



ÍtróttaSosialin
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

Endaumfarið hómast

Næstseinastu dystir í innleiðandi umfarinum hjá kvinnunum vóru leiktir mánadagin. VB, HB, KÍ og B36 eru tryggjaðir luttakarar í endaspælinum, meðan NSÍ og Skála styrktu sær um støðuna a triðja plássi, sum gevur atgongd til endaspælið

Kvinnurnar hjá HB og VB hava longu tryggjað sær sess í endaumfarinum. Væntandi verður Skála triðja liðið úr bólki A

HEINI Í SKORINI

Mánadagin var næstseinasta umfar í innleiðandi kappingini hjá kvinnunum leikt. Í bólki A er langt síðani avgjørt, at HB og VB fara víðari til endaspælið, meðan tað eftir dystirnar mánadagin er líkt til, at Skála verður triðja liðið úr bólki A, sum kemur í endaspælið. Tær hava vunnið flestu dystirnar móti hinum veikaru liðunum í bólki A í ár, og tær hava til tíðir spælt góðan fótbólt. Mánadagin leiktu tær móti botnliðnum Sumba og vunnu dystin sannførandi, hóast nakað tepurt, 2-0. Hálvleiksstøðan var 1-0, og týdningarmiklu málini hjá Skála skutu Elin Jacobsen og Anna Olsen.

HB spældi í vindi og regni úti á Argjum móti AB, og tær vunnu heili 9-0. Vegna ringt veður varð sera torført at leika, og tí kom tað vakra fótbóltsspælið ongantíð til sjóndar. Tá avtornaði vunnu HB kvinnurnar sum sagt heili 9-0. Eitt navn sum vit mest kenna frá hondbóltinum, Lotte Sørensen, er eisini farin at gera um seg í fótbóltinum, og hon skeyt tvey av HB málunum. Annika Godtfred skeyt heili fýra mál, meðan Gunn Muller, Maria Johnsson og Eyðfríð Christiansen allar fingu hvør sítt. HB skorar nógv mál í ár, tað er so heilt víst, men ein orsøk til góðu HB úrslitini í ár er, at tær hava eina sera góðu verju, har serliga Liljan Jespersen og Silja á Borg eru tveir sera góðir verjuleikarar.

VB var í Gøtu og leikti móti GÍ, og tær vunnu ikki serliga óvæntað 6-2. Tað hevði verið sera gott fyri GÍ at fingið stig burtur úr hesum dysti, men tað megnaðu tær ikki. Hjá GÍ skeyt ein sera vælleikandi leikari gjøgnum hetta árið, Heidi Jacobsen, bæði málini. Hjá VB fingu Guðrun í Lágabø og Rannvá Augustinussen tvey mál hvør, meðan toppskjúttin Halltóra Joensen og síðani Rini Mørk skutu eitt mál í part. Av tí at Skála vann á Sumba, er møguleikin hjá GÍ at koma víðari lítil, men næsta vikuskiftið skulu hesi bæði liðini møtast, og tá fellur avgerðin um triðja plássið í bólki A. Við einum sigri tekur GÍ seg framum Skála, meðan tað er nóg mikið hjá Skála við einum javnleiki.

KÍ vann týdningarleysan toppdyst

Í Havn var toppdystur í bólki B millum KÍ og B36. Hóast hesin dystur var spennandi og áhugaverdur, hevði hann í roynd og veru ongan týdning fyri bæði liðini og heldur ikki fyri kappingina. KÍ og B36 eru nevniliga langt síðani komin til endaspælið á ávikavist fyrsta og øðrum plássi. Men hóast tað høvdu B36 kvinnurnar so avgjørt nakað at prógva mánadagin, av tí at seinast tær møttu KÍ í landskappingini, endaði dysturin heili 9-0 til KÍ. KÍ var betra liðið mánadagin, og tær fingu tvey skjót mál, soleiðis at støðan var 2-0 til KÍ í hálvleikinum. Málini hjá KÍ skutu Viviann Bjartalíð og Malena Josephsen. Síðani høvdu bæði liðini møguleikar at fáa mál, og her var tað einamest KÍ, sum var nærri við at økja um leiðsluna, hóast B36 eisini hevði okkurt boðið. Men heilt seint í dystinum eydnaðist tað B36 at minka um munin, soleiðis at endaliga úrsliti gjørdist 2-1 til KÍ. Málið hjá B36 skeyt Guðrið Dam .

Á Sandi leiktu B71 og NSÍ, og hesin dysturin endaði 5-2 til runavíkingar. Harvið styrktu tær seg nógv um støðuna á týdningarmikla triðja plássi, sum jú gevur atgongd til endaspælið. Málini hjá B71 gjørdu Gerda Magnussen og Rannvá Sørensen, og síðstnevnda hevur ikki verið á vøllinum í tvey ár. Tað er sera illa statt við fólki suðuri á Sandi í løtuni vegna skaðar, og tað gjørdist ikki betri, tá málverjin hjá sandoyingum eisini mátti fara út við skaða.

Hálvleikstøðan í dystinum var 3-1 til NSÍ, so tað var næstan avgjørt í hálvleikinum, hvør fór avstað við sigrinum. Maibritt Olsen skeyt eitt mál fyri NSÍ, og síðani skutu Irdi Hansen og Elinbjørg Hammer tvey mál í part.

Sostatt er næstan víst, nú bert eitt umfar er eftir, at liðini ið koma at mynda endaspælið vera HB, VB og Skála úr bólki A, og úr bólki B vera tað KÍ, B36 og NSÍ. Hini liðini fara til endaumfarið fyri tey lið sum ikki komu víðari, og tað verður kallað 2. deild kvinnur.

Bólkur A:

HB-AB 9-0
HB: Lotte Sørensen 2, Annika Godtfred 4, Eyðfríð Christiansen 1, Gunn Muller 1, Maria Johnsson 1.

GÍ-VB 2-6
GÍ: Heidi Jacobsen 2.
VB: Halltóra Joensen 1, Guðrun í Lágabø 2, Rannvá Augustinussen 2, Rini Mørk 1.

Skála-Sumba 2-0
Skála: Elin Jacobsen 1, Anna Olsen 1.

Bólkur B:

B36-KÍ 1-2
B36: Guðrið Dam
KÍ: Malena Josephsen 1, Viviann Bjartalíð 1.

B71-NSÍ 2-5
B71: Gerda Magnussen 1, Rannvá Sørensen 1.
NSÍ: Irdi Hansen 2, Elinbjørg Hammer 2, Maibritt Olsen 1.

Máltindurin

Halltóra Joensen	VB	21
Annika Godtfred	HB	15
Rannvá Andreasen	KÍ	13
Rakul N. Joensen	B36	10
Eyðfríð Christiansen	HB	10
Malena Josephsen	KÍ	9
Guðrun í Lágabø	VB	9
Laila Jespersen	VB	8
Maria Johnson	HB	7
Irdi Hansen	NSÍ	7
Rannvá Augustinusen	VB	6
Elin Kathrina Haraldsen	AB	5
Heidi Jacobsen	GÍ	5
Borglis Fagradal	Skála	5
Maria Mikkelsen	AB	4
Elin Højsted	B71	4
Kristbjørg Isaksen	GÍ	4
Vivian Thorleifsson	HB	4
Mariann Joensen	KÍ	4
Gurið Mortensen	VB	4
Arnbjørg Danielsen	B36	3
Elsebeth Jónsson	B36	3
Laila Enghamar	B36	3
Sólvá Joensen	B36	3
Súsanna Hansen	B36	3
Vivian Bjartalíð	KÍ	3
Maibritt Olsen	NSÍ	3

adidas

	d	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 HB	8	8	0	0	44	2	42	24
2 VB	8	7	0	1	58	7	51	21
3 Skála	8	4	0	4	14	44	-30	12
4 GÍ	8	2	1	5	15	29	-14	7
5 AB	7	1	2	4	12	41	-29	5
6 Sumba	9	0	1	8	6	26	-20	1

	d	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 KÍ	6	6	0	0	36	8	28	18
2 B36	7	5	0	2	36	13	23	15
3 NSÍ	7	3	1	3	17	24	-7	10
5 EB/Str.	7	1	1	5	4	29	-25	4
4 B71	7	1	0	6	11	30	-19	3